# Fyriskipan fyri virksemi hjá ráðgevandi nevndini fyri altjóða menningarsamstarv

Við heimild í løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 § 4 stk. 3 um altjóða menningarsamstarv hevur løgmaður fyrisett soljóðandi fyriskipan fyri virksemi hjá ráðgevandi nevndini fyri altjóða menningarsamstarv:

**§ 1.** Løgmansskrivstovan boðar til fyrsta fund í nývaldu nevndini. Tá verður formaður valdur og næstformaður í nevndini millum nevndarlimirnar.

**§ 2.** Løgmansskrivstovan letur nevndini skrivara og skrivstovuhald og hevur um hendi skjalagoymslu nevndarinnar.

**§ 3.** Skrivari nevndarinnar boðar til fundar í nevndini, við í minsta lagi 8 daga freist. Saman við fundarfráboðanini verður send hvørjum nevdarlimi fundarskrá og møguligt skjalatilfar.
*Stk. 2.* Vanliga upplýsir formaðurin við fundarlok, nær komandi fundur verður.

**§ 4.** Skrivarin skrivar fundarfrásøgn við upplýsingum um:
1) Hvør, ið hevur luttikið.
2) Evnini í fundarskránni.
3) Hvørjar niðurstøðurnar eru í einstøku fundarevnunum.

*Stk. 2.* Í teimum førum har nevndin ynskir tað, verður frásøgnin gjørd við samandrátti av øllum, sum sagt verður á nevndarfundi.
*Stk. 3.* Á næsta fundi verður fundarfrásøgnin løgd fram til góðkenningar, og verður, tá ið hon er góðkend, undirskrivað av formanni og skrivara og løgd í skjalagoymsluna.

**§ 5.** Nevndin er viðtøkufør, tá ið helmingurin av limunum, heruppií formaðurin ella næstformaðurin, er á fundi.
*Stk. 2.* Mál er samtykt tá ið fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti. Stendur á jøvnum er málið fallið.
*Stk. 3.* Nevndarlimirnir hava skyldu at boða hvørjum øðrum frá einum og hvørjum spurningi, sum kann verða orsøk til at viðgera spurningin um gegni nevndarlimsins.

**§ 6.** Nevndarformaðurin stýrir nevndarfundunum.
*Stk. 2.* Hevur formaðurin forfall, tekur næstformaðurin við størvum formansins.

**§ 7.** Nevndarlimirnir fáa samsýning sambært galdandi reglur um samsýning av nevndarlimum í alment settum nevndum.

Tórshavn hin 1. november 2007

**Jóannnes Eidesgaard (sign.)**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir (sign.)